# Tveir dystir á skránni í kvøld

Tveir dystir vera á skránni í kvøld í meistaradeildini hjá kvinnum. Á Giljanesi tekur oddaliðið, Dráttur, ímóti Mjølni, sum liggur aftast í kappingini. Her er Dráttur stórur favorittur at vinna dystin, og um tær gera hetta, so vera tær framhaldandi einsamalt oddalið í bestu kvinnudeildini. Hin dysturin verður í Kollafirði, har KÍF á næstaftasta plássi tekur ímóti ÍF, sum við einum sigri kann fara fram við TB, og leggja seg einsamalt á annað pláss. Gongdin hjá KÍF hevur verið alt annað enn góð seinastu vikurnar, so ÍF má metast at vera favorittur at vinna dystin.



# Wilbek fingið sekkin

Fyri knøppum tveimum vikum síðani var venjarin hjá danska manslandsliðnum í hondbólti, Ulrik Wilbek, í føroyum, har hann helt ein fyrilestur á Føroya Tele um motivatión. Í gjár bleiv kona hansara, Susanne Munk Wilbek, søgd úr starvi sum hjálparvenjari hjá Viborg. Orsøkin var ósemja millum hana og høvuðsvenjaran, Thomas Ryte, um ítróttarliga politikkin í felagnum. Eftir keypi av stjørnuleikaranum, Bojana Popovic, boðaðu fleiri av ungu donsku leikarunum í Viborg frá, at tær helst fara at finna sær annað felag.



*Fimm ymisk lið vunnu kappingarnar hjá dreingjum, har TB og SÍ gjørdust mest vinnandi liðini. Nøvan, sum júst hevur tikið liðið úr meistaradeildini, vann kappingina hjá mansunglingum frammanfyri SÍ og TB, og hetta gevur helst liðnum av Oyrarbakka góðar vónir uppá framtíðina.*

**Mansunglingar:**

| | |
|---|---|
| Nr. 1: | Nøvan |
| Nr. 2: | SÍ |
| Nr. 3: | TB |

góð úrslit, og tí gjørdust teir mest vinnandi liðið hjá dreingjunum. Í hølunum á teimum kom SÍ, sum eisini vann eina kapping. SÍ vann kappingina hjá dreingjum 16 ár, men eisini teir fingu fleiri onnur góð úrslit, so júst TB og SÍ settu dagsskránna hjá dreingjunum.

Mjølnir megnaði eisini at vinna eina kapping hjá dreingjunum, tá teir vunnu dreingir 12 ár. At hetta er sterkasti aldursbólkurin hjá Mjølni kom væl til sjóndar, tí Mjølnir megnaði nevniliga eisini at vinna bronsu í hesum aldursbólkinum.

## Nøvan vann mansunglingar

Tvey onnur lið megnaðu eisini at vinna kappingar hjá dreingjunum. Í yngsta aldursbólkinum megnaði Dráttur at vinna sína einastu medalju hjá dreingjunum, meðan Nøvan vann mansunglingarnar.

Fyri knappari viku síðani valdi Nøvan at taka liðið úr kappingini í meistaradeildini hjá monnum, tí teir mettu ikki grundarlag vera fyri at halda fram restina av kappingini. Liðið hjá Nøvuni hevur verið sera ungt, og teir hava havt ilt við at spæla upp í móti royndu leikarunum hjá hinum feløgunum. Tí var stuttligt at síggja, at ungu leikararnir hjá Nøvuni megnaðu at vinna mansunglingakappingina, og hetta boðar samstundis frá einum góðum og evnaríkum liðið, sum tó er nakað ungt enn at skula klára seg í bestu deildini. Men kanska teir vera klárir um fá ár, tá leikararnir hava fingið eitt sindur fleiri royndir.

Annars er at siga, at fleiri aðrir kappingar vera á skránni fyri yngri deildir hetta kappingarárið. Næsta kappingin á skránni hjá teimum yngru verður Mjølnir kappingin. Hon verður leikt í Klaksvík og á Kambsdali tann 20. januar.

## FAKTA

**Medaljur samlað:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Fleyr: | 3 gull | 1 silvur | |
| TB: | 2 gull | 3 silvur | bronsu |
| SÍ: | 1 gull | 3 silvur | 1 bronsu |
| Mjølnir: | 1 gull | 1 silvur | 1 bronsu |
| KÍF: | 1 gull | | 2 bronsu |
| Dráttur: | 1 gull | 1 bronsu | |
| Nøvan: | 1 gull | | |
| ÍF: | | 2 silvur | 1 bronsu |

**Vinnarar dreingir:**

**Dreingir 16 ár:**

| | |
|---|---|
| Nr. 1: | SÍ |
| Nr. 2: | TB |
| Nr. 3: | ÍF |



**Dreingir 14 ár:**

| | |
|---|---|
| Nr. 1: | TB a |
| Nr. 2: | ÍF |
| Nr. 3: | TB b |



**Dreingir 12 ár:**

| | |
|---|---|
| Nr. 1: | Mjølnir a |
| Nr. 2: | Fleyr a |
| Nr. 3: | Mjølnir b |



**Dreingir 10 ár:**

| | |
|---|---|
| Nr. 1: | Dráttur |
| Nr. 2: | TB |
| Nr. 3: | SÍ |

